

*Frederik Hansen frá Skipafelagnum Føroyar er sum 'Base Manager' dagligur leiðari fyri oljuútgerðarhavnina í Runavík.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

# Atlantic Stand By

**Atlantic Supply Base liggur í vetrardvala fram til summarið 2005 - innan tess gevur tað ikki meining at hava fólk í føstum starvi, vísir nevndarformaðurin á**

LOGISTIKKUR
*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Tað var ongantíð meiningin at Atlantic Supply Base skuldi hava fólk í føstum starvi uttan veruligt arbeiði. So, hóast tað er keðiligt at siga fólk upp, har var einki í at velja: seinkingar í royndarboringunum á tí føroyska landgrunninum høvdu sínar natúrligu fylgjur.

Nakað soleiðis ljóðar resonementið hjá teimum flestu vit hava tosað við um Atlantic Supply Base, nú ið stjórin er sagdur úr starvi og virksemið eftir øllum at døma fer at liggja lágt fram til næstu royndarboringar á sumri 2005.

"Einki offshore virksemi er við Føroyar í løtuni," staðfesti formaðurin í nevndini fyri Atlantic Supply Base, Nils Sørensen.

"Vit mugu sjálvandi skrúva blussið niður so nógv sum møguligt sum støðan er… Vit bíða jú eftir virksemi. Tað bleiv ikki tann kontinuitetur sum vit høvdu hugsað okkum. Fýra boringar eru eftir í fyrsta loyvirumfari hvar støðin í øllum førum skal brúkast. Men sum tað er í løtuni halda vit stongt, og lata upp aftur tá tørvur er."

Endamálið hjá Atlantic Supply Base var millum annað at fáa eina olju útgerðar havn í Runavík og partaeigararnir í felagnum er fyritøkur í Eysturoy umframt Føroya Kolvetni ið er størsti eigari.

"Men er eingin boring so er einki virksemi," vísti nevndarformaðurin á, "tað er jú boringarnar sum eru drívmegin. Tað tekur langa tíð at byggja hetta upp og basin verður ikki opin alt árið fyrr enn meira virksemi kemur. Tað er í grundini einki forgjørt í at liggja lágt beint nú, tí basin byggir á boringarnar."

"Runavíkar Býráð skilir eisini. Tað varð lagdur dentur á realismu frá byrjan, hóast alt.

Kommunan bygdi eina serliga kai sum hellir inneftir – hon skal kunna brúkast sum oljuhavn og annað… Men tað er ein langtíðar íløga sum samstundis ikki er ovurstór. Samstarvið við Skipafelagið hevur eisini gjørt sítt til at ASB er sloppið undan at gera nakrar størri íløgur. Felagið hevur veitt tænastu í teimum fýra boringunum higartil og tað hevur fungerað væl."

Nevndarlimirnir eru annars, umframt Nils Sørensen, John Eli Olsen, Olaf Olsen, Áki í Skemmuni og Ólavur Olsen.

Tann fráfarandi stjórin Lassi Borðoy var fámæltur men kundi illa dylja ein ávísan harm.

"Hvat skal man siga?" viðmerkti hann. "Tá einki arbeiði er, so er einki arbeiði… Her er einki at viðmerkja. Vit roknaðu við og gingu jú út frá at tað fór at vera virksemi undir 2004… Tað var jú lagt upp til at átta brunnar skuldu borast innan tey fyrstu trý árini men tað bleiv bara helvtin. Tað var keðiligt at tað skuldi draga út, men tað gerst ikki við. Teir mugu so seta fólk aftur tá boringin fer í gongd aftur."

Lassi Borðoy var stjóri á Atlantic Suply Base í smá trý ár; formelt situr hann í starvi fram til 1. mars. Hann arbeiðir annars á skeiðsdeildini hjá Føroya Sjómansskúla; har fer hann nú frá hálvari til fulla tíð.

## 'Ein nýggjur partur'

Sáttmálin millum ASB og Skipafelagið Føroyar øðrumegin og tey í Føroyum virknu oljufeløgini hinumegin, kom í lag aftan á at oljufeløgini í felag lýstu út licitatión fyri at fáa tilboð upp á eina útgerðar havn. Hetta kann síggjast í samanhangi við tað føroyska kravið ásett via Løgtingslóg um Kolvetnisvirksemi, har tað millum stendur: "(...) flutningur av útgerð og fólki til og frá føroyskum øki skal fara um føroyskan bryggjukant ella føroyskan flogvøll."

Skipafelagið Føroyar hevur sambært upplýsingar ikki koyrt fólk heim síðani oljuboringarnar hildu uppat á hesum sinni.

Ein av teimum sum vóru við til at gera uppleggið hjá Runavík var Tórheðin Jensen, sølu- og marknaðarstjóri á Skipafelagnum Føroyar.

Sambært Tórheðin Jensen bygdi uppleggið frá ASB og Skipafelagnum frá byrjan á at tað einans var virksemi um summarið, at raksturin ikki skuldi vera ov dýrur, og at íløgurnar skuldu vera minimalar.

"Við Skipafelagnum sum samstarvsfelaga høvdu vit alt," staðfesti Tórheðin Jensen. "Vit høvdu fólk sum kundu lænast eftir tørvi, vit høvdu pakkhús, kranar, bingjur, you name it…"

Tórheðin Jensen vísti á at talan var um logistikk, um enn eitt speciliserað slag av logistikki.

"Hvat er ein olju útgerðar havn í grundini?" spurdi hann. "Skipafelagið hevur hanterað góðs við egnum pakkhúsi í Runavík í meira enn 30 ár. Ein olju útgerðar havn snýr seg um logistikk - og tað er júst tað sum Skipafelagið hevur fingist við í umleið eina øld. Talan er ikki um nakað nýtt vinnuøki, heldur er talan um ein nýggjan part í einum vinnuøki, ein partur sum setir síni serligu krøv."




STILL going strong



STILL R20-15 i er ein lítil og sera smidligur trukkur. Lyftiorkan er 1,5 tons. El-motorurin hevur vakt miklan ans í øllum Evropa, av tí at hann, uttan trupulleikar, kann koyra í sera vátum umhvørvi.



STILL RX50-16. Ein nýggjur trukkur út í odd og egg. Við einari breiðari og tunnari mastur, er sýnið týðandi betrað - tað er nakað, ið allir trukkførarar virðismeta. Orkunýtslan er minkað við 30%, men tó lyftir og akselererar RX50-16 skjótari enn allir í sínum klassa.



STILL R60-25 i er eisini nýggjur á marknaðinum. Trukkurin hevur eina nýggja fullfíggjaða vendistreymstøkni, sum tryggjar størri mótstøðuføri í vátum umhvørvi. Harafturat hevur hann ein nýggjan fingrastýrdan stýripinn.

P/f Esmar Simonsen
Kambsdalur · FO-530 Fuglafjørður · Tel 44 44 05 · 44 46 29 · es@es.fo · www.es.fo